# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Altjóðagerð – marknaðarsamgongur

Vit hava á hesum teigi ofta viðgjørt altjóðagerðina ella globaliseringina, sum hetta fyribrigdið eisini nevnist. Globaliseringin ávirkar allan tann framkomna heimin, og ymiskt er, hvussu londini takla hesa tilgongd. Fíggjarkreppan hevur í ólukkumát avdúkað, hvussu illa fyrireikað eitt nú stórveldið USA er til altjóðagerðina, samstundis sum kreppan hevur undirstrikað, at alt fíggjarligt og búskaparligt virksemi í heiminum hongur saman. Einki land, eingin tjóð er longur ein oyggj, einki land sleppur longur at vera ein oyggj. Tann tjóð, sum vil liva og mennast, má læra at samstarva, at samskifta og at sannkenna tann nýggja veruleikan, at endurskoða gamlar sannleikar. Tað er neyðugt at læra at liva í nýggju heimsmyndini.

Norðurlond, sum eru millum heimsins fremstu lond sóu tíðliga almheimsgerðina, og flestøll teirra høvdu strategiir til reiðar til tess at takla hesa nýggju heimsstøðu. Hóast hesar strategiir vórðu Norðurlond tikin á bóli, tá fíggjarliga skriðan leyp, summi meira og summi minni. Tað sum hevur undrað, eitt nú í Europa, er, hvussu illa tað gekk hjá ES at takla kreppuna. Tað tóktist, sum ES eins og flestu stjórnirnar varð tikið á bóli og alt ov long tíð gekk til ES kom á vøllin. Tá ES so kom á vøllin hevði ein ligið sjóvarfallið av sær, og t.d. Týskland og Bretland høvdu gjørt sínar egnu verjuskipanir. Kortini eydnaðist tað ES langt un leingi at semjast um nøkur neyðug samskipað tiltøk, ið gjørdu sítt til at limalondini og teirra samstarvspartar sluppu so toluliga snikkaleys úr ruðuleikanum.

Kreppan hevur avdúkað, hvussu allur tann framkomni heimurin hongur saman. Globaliseringin ger tað alt týðuligari, at tann, sum situr í sjálvdrátti gerst eftirbátur. Hóast eitt nú ES, tá á stóð, vísti seg ikki at vera hitt besta amboðið til at takla fíggjarkreppuna, so kemst ikki uttanum, at ES er ein tann størsti búskapurin í heiminum og ein okkara størsti handilspartnari. Tað sleppst tí ikki uttanum, at Føroyar noyðast at finna ein nýggjan samstarvsform við hetta samveldið. Tað er í fínasta lagið, at vit gerast limir í EFTA, um hetta ber til. Í EFTA eru okkara størstu kappingarneytar í fiskivinnumálum og útflutningi av fiskavørum. Tað kann bert gagna at kunna fylgja beri við tilgongdini í hesum høpi. Men tað er hinvegin góðtrúgvið at halda, at EFTA limaskapur av sær sjálvum gevur okkum EBS sømdir. Vit eru tí noydd til at finna okkara egna veg til eitt nógv tættari samstarv við ES, enn vit hava í dag. Øll framkonin lond hava betri avtalur við ES, enn vit hava. Her hava vit veruliga ligið sjóvarfallið av okkum – snorksovuið í tímanum. Tað er tí beint og skilagott, at tað nú verður sett eitt mál fyri ES politikkinum, nevniliga at vit innan trý ár skulu hava fingið eina nógv betri avtalu og eitt nógv tættari samstarv. Bæði í Íslandi og í Noregi er røringur í ES málinum, og tað skal ongan undra, um hesi lond ikki nú fara at nærkast ES av álvara. Verða vit løgd afturum í hesi tilgongd, kunnu vit fáa stórar trupulleikar, og tí hevur ES málið ikki minni skund og ikki minni týdning enn EFTA málið.

**Sosialurin**

## Fólkaræðisligt undirskot

**JÓGVAN ARGE**
varaborgarstjóri



Stýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu eigur at verða ment soleiðis, at tey valdu umboðini fáa veruligar umstøður at røkja áhugamálini hjá borgarunum í dagliga kommunala arbeiðnum.

Kommunan er bygd upp sum eitt nevndarstýri, har tær mongu nevndirnar viðgera øll mál og taka avgerð í teimum, áðrenn tey verða beind til býráðið til endaliga samtykt.

Allir nevndarlimirnir hava býráðsarbeiðið framíhjá og kunnu vanliga ikki møta á fundi fyrrenn eftir arbeiðstíð.

Kommunan hevur eina umsiting, sum við borgarstjóranum sum ovasta leiðara tekur sær av dagliga rakstrinum og fyrireikar tey mongu málini til politiska viðgerð.

Men so hvørt, sum kommunan veksur, málini vaksa í vavi og tali, og fleiri uppgávur verða lagdar á kommununa, tekur seg eisini upp eitt álvarsamt fólkaræðisligt undirskot.

Hetta stendst av, at tey valdu umboðini koma longur og longur burtur frá kjarnanum og hava smærri og færri møguleikar at ávirka málini, meðan tey ganga. Teirra leiklutur byrjar stundum ikki av álvara, fyrrenn tað kemur til skarpskeringar at siga ja ella nei.

Sjálvsagt er tað avmarkað, hvat ein einsamallur maður ella kvinna kann koma út fyri at hava tak á í eini fyrisiting, sum umsetir fyri 600 mió kr. um árið og skal tæna 20.000 borgarum.

Tí hevur Tjóðveldi sett sær fyri at strongja á at menna kommunalu stýrisskipanina soleiðis, at býráðslimirnir fáa dyggari møguleikar at røkja sínar skyldur.

Meta vit saman við landið, so hava teir 33 løgtingslimirnir níggju aðalráð og níggju landsstýrisfólk at útinna sítt vald og tæna 48.500 borgarum. Og á tingi og í landsstýri verður talað fyri at flyta uppgávur frá landinum til kommunurnar.

Í øðrum londum eru ymsar skipanir fyri ymsar kommunur, m.a. eftir støðd og innihaldi.

Ein myndil fyri Tórshavnar kommunu kundi verið, at tann politiska umboðanin í dagliga arbeiðnum varð styrkt, og at býráðið valdi 2-3 politikarar til undir liðini á borgarstjóranum at varða av ávísum málsøkjum.

Við eini tílíkari skipan hevði borið til at skipað politiska arbeiðið soleiðis, at nevndirnar kundu brúkt kreftirnar til at taka sær av teimum stóru linjunum í politikkinum heldur enn fløkjast í smámálum.

Hetta hevði verið fremjandi fyri skjótleikan og dygdina í málsgongdini.

Tað er natúrligt, at kommissiónin, sum landsstýrið ætlar at seta at viðgera framtíðar kommunal viðurskifti, eisini tekur hendan partin við.

## Reinsaríið sum spælistað

**HALLA SAMUELSEN**
býráðslimur, valevni hjá Javnaðarflokkinum



Nú í eina tíð hevur Reinsaríið verið roynt til livandi tónleikaframførslur. Hetta er gjørt fyri at vita hvussu hølið riggar at hava tað sum spælistað. Havi sjálv verið og lurtað nakrar ferðir, og havi tá tosað við tónleikarar, sum hava spælt, og sum eisini hava verið áhoyrarar. Øll tey, sum eg havi tosað við, siga hvussu væl hetta hevur eydnast og hvussu væl Reinsaríið riggar sum spælistað. Eisini liggur Reinsaríið sera væl fyri í Mentanargøtuni (Tórsgøtu).

Beint fyri summarferiuna játtaði býráðið pengar til eina verkætlan at gera Reinsaríið klárt til varandi almenn endamál. Gerast skulu fleiri ábøtur, so sum wc, hiti og aðrar vanligar innleggingar. Tað er sostatt ikki endaliga avgjørt hvat Reinsaríið skal nýtast til.

Nú hava tónleikarar bíðað og longst eftir einum spælistaði í langa tíð, og enn er óvist um Reinsaríið yvirhøvur verður til spælistað. Tað skal býráðið avgera í síðsta enda.

Mín vón er, at Reinsaríið verður nýtt sum spælistað framyvir.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir støðuna og vit ynskja at gera nakað við hetta, nevnliga at gera spæliumstøðurnar hjá tónleikarunum betri.

Fái eg tín stuðul til Býráðsvalið tann 11. november, ert tú við til at betra um umstøðurnar hjá tónleikarunum. Eg skal so gera mítt til, at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

X við lista C

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.